LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TOYOTA AVENSIS
Silvurgráur Toyota Avensis TD Terra, árg. 03/2001 til sølu. Bilurin er í góðum standi og hevur koyrt 79.000 km.
Tlf. 318279/211742

KIA CARNIVAL
2.9 TD, árg. 2000 til sølu, 66.000 km, roykfríur og vælhildin.
Tlf. 211841

MAZDA B2500 TIL SØLU
Pick Up, árg. 1997, diesel, hevur koyrt 159.000 km.
Tlf. 421142

YNSKIST
Motorur ella toppstykki til ein Opel Astra 1.7 TD, árg. 96, Motorkodan er X17BTL ynskist til keyps.
Tlf. 212320

TOYOTA COROLLA
árg. 2000 til sølu, koyrt 55.000 km, hevur nýggj summardekk á sportfelgum + pikadekk og musikkanlegg.
Tlf. 224259

VW TRANSPORTER
árg. 1997, 2.5 Bensin, koyrt 112.000 km, til sølu.
Áhugað ringi 210926/371926

FORD TRANSIT T
frá okt. 2002, koyrt 24.000 km til sølu.
Tlf. 371926

BMW 320 D
árg. 99 til sølu um hóskandi boð fæst. Træpanel á hurðum og instrumentborði. Radio, fartpilot og tlf. kann stýrast á róðrinum.
Tlf. 227733

PEUGEOT 405 GTX 1.9
árg. 1995, st.car, turbo diesel, koyrt 149.000 km, ógvuliga vælhildin, fløguspælara, el-rútar. Til sølu fyri 65.000 kr.
Tlf. 582983

VÆLHILDIN FORD ESCORT 1800 TD
Til sølu. Árg. 1998. Bilurin er sera vælútgjørdur, t.d. AC-fløguspælara, el-rútar framman, hita í setrum framman og forrúti. Eyka felgur fylgja við. Áhugað ringja
Tlf. 361623 ella 252854 eftir kl 17.00

TOYOTA COROLLA 1.6 DX
Árg. 87. Sýnaður 11.03, + 4 pikadekk á felgum og fløguspælari til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 229913

DEKK
4 stk. lítið brúkt summardekk stødd 185/65-14. Merki Dayton seljast bíliga.
Tlf. 213802

FORD FIESTA 1.1 CL
03/91. Heilt bíliga til sølu.
Tlf. 320832

VIÐFESTIVOGNUR YNSKIST
Viðfestivognur til persónbil ynskist til keyps.
Tlf. 744478

FORD ESCORT SAVOY
Árg. 89 til sølu fyri kr. 5.000. Sýnaður seinast nov. 03.
Tlf. 213695

4 x 4 DEKK
á aluminiumsfelgum, lítið og einki brúkt, bíliga til sølu.
Tlf. 503938

FORD ESCORT CLX DIESEL
árg. 1996, er í góðum standi, fá nærri at vita um bilin við at ringja
tlf. 317565

MOTORUR YNSKIST
Til ein Honda Civic ella eitt toppstykki og knastaksil. Árg. 92-95. Motor nr. D15B2.
Tlf. 263862

FOR SALE
Parts for Toyota Carina 1983 1.6 l motor and 5 spd gear case. Windows, trims and more. Also set of 6 diesel fuel injectors and head gasket for Perkins 6.354 motor.
Tlf. 440559

PEUGEOT 406 2.0 16V
Útgerð: el-rútar, hita í setrinum, regnsensor, árg. 96, km 165.000, 80.000, nýsýnaður, nýmáladur.
Tlf. 441707

HONDA CIVIC 1:8 VTI
Árg. 97, koyrt 55.000 kr. Motor og innventar á bilinum skal mont. Prísur 65.000 kr. (Bilurin er nýlakeraður).
Tlf. 585585

PEUGEOT 406 2.0
Árg. 09.96 í góðum standi til sølu fyri 89.000 km. Møguliga kann bíligari bilur ganga inn í keypið.
Tlf. 585585

LÍTIL FITTUR
og økonomiskur bilur til sølu vegna flyting. Peugeot 106 1.5 diesel, árg. 97. Hevur koyrt 136.000 km. Annlegg í og pikadekk fylgja við.
Tlf. 507005 ella 251240

TIL SØLU
VW Golf TD, 5 hurðar, árg. 1991, sýnaður 14.6.04.
Tlf. 314330

MERCEDES VITA 110 D
vørubilur, árg. 99, í góðum standi, til sølu fyri 125.000 kr. v/ MVG. Møguliga kann annar bilur ganga inn í keypið.
Tlf. 585585

HONDA ACCORD 2.0 XI
árg. 87, hevur ongan plátur, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 585585

TIL SØLU
Telma bremsa til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 585585

SPORTFELGUR
við dekkum 205/55/16. Felgurnar eru orginalar Peugeot og hava staðið á Peugeot 406 Coupe, dekkini hava rulla einans 1000 km. Nýprísur ca. 15.000 – til sølu fyri 8.500 kr.
Tlf. 585585

TOYOTA COROLLA GALLA 1.3 TIL SØLU
árg. 95, bilurin hevur ABS-bremsur, airbag, 16" sportfelgur, vel, eykafelgur við pikadekkum fylgja við, er í góðum standi, bert koyrt 119.000 km.
Tlf. 227248/441428

MAZDA 6 TIL SØLU
15.000 km, 11 mán. (sum nýggjur) 170 HK, leðurinntrekk, vælhildin.
Tlf. 212779

TIL SØLU
4 felgur við góðum pikadekkum til Avensis - 5 hol
Tlf. 219144

FORD ESCORT
til sølu, árg. 95, 117.000 km, nýsýnaður.
Tlf. 224485

VOLVO 940 CLASSIC
árg. 96 í sera góðum standi til sølu.
Tlf. 447942

GRØNUR OPEL ZAFIRA
7 setur, árg. 11/99, koyrt 42.000 km, til sølu um hóskandi boð fæst. Áhugað kunnu ringja
tlf. 316832 eftir kl. 17

PEUGEOT 607
frá august 2002 til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 211300

CITROEN ZX TIL SØLU
Frá 1992 og í góðum standi. Hevur CD anlegg og nýggja kobling. Til sølu fyri 20.000.
Ring 229979 og hoyr nærri

MAZDA 626
árg. 1985, synet 01.04. Kører godt, trænger til lídt reparation. Pris 5.000,-
Tlf. 448474 e. kl. 19

FORD SCORPIO
2.5 TD, árg.91 til sølu. Bilurin er silvurgráur og hevur 15" alufelgur, tokulyktir, sóltak, el-spegil v/ hita, el-rútar (fr.), servostýring, fløguspælara, 4 pikadekk á felgum. Í sera góðum standi, sýnaður des. 03.
Tlf. 268650

FIAT PUNTO CABRIO
til sølu sera bíliga. Bilurin er frá 06/97. Hevur koyrt 125.000 km, er sýnaður 5/04. CD-spælari, sportfelgur við góðum dekkum.
Tlf. 212072

HONDA CIVIC 1.4
árg. 96 við nógvari eykaútgerð, automatgear, aircon. og cruise control, til sølu.
Tlf. 310300/284300

DAIHATSU G 100
til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 311641 - 211641

TIL SØLU
Orginalar Peugeot 306 GTI. 15" alu. felgur (cyklone). Passa eisini til 406 og Partner. Fyri bert 2800 kr.
Tlf. 222195

TIL SØLU
Ein Ford Sierra 2.0 i Ghia í góðum standi til sølu. Bilurin er frá 1988 (sýnaður juni 2004), hevur aut. transm., ABS-bremsur, servostýring, sóltak, elektr. rútar framman. 4 pikadekk og ymiskir eykalutir fylgja við.
Tlf. 504020

PIRELLI DEKK
4 spildurnýggj Pirelli dekk 195/65 R15 91 H til sølu til hægstbjóðandi. Passa m.a. til BMW 15" felgur.
Ring 218022

LASTBILUR TIL SØLU
Ein gráur Mazda B2500 TD lastbilur, árg. 03/2002, hevur koyrt 60.700 km, við plastikk lastverju til sølu. Ring ella skriva til
tlf. 224255 ella joensen_81@hotmail.com

TOYOTA COROLLA
diesel, árg. 2002, koyrt 44.000 km,
Tlf. 220944

PEUGEOT 406
Árg. 05/98, 110 HK. Sera, sera vælhildin. Sær betri út enn nýggjur. Stendur altið inni.
Tlf. 315078 ella 215698

DIESELBILUR TIL SØLU
Ford Scorpio 2.5 D árg. 87, í góðum standi og við nógvum eykalutum bíliga til sølu.
Tlf. 223037

TIL SØLU
Saab 900 í góðum standi, nýsýnaður, sær gott út og koyrir væl. Kr. 17.000,-
Tlf. 223617

MITSUBISHI SHOGUN
4 x 4 2.5 TD nýsýnaður, árg. 89, góður og rúmligur vørurogvnur, góðkendur til 4 persónar til sølu fyri 25.000 kr.
Tlf. 580176 eftir kl. 17

TOYOTA COROLLA 1.6 DX
árg. 87, sýnaður 11/03. CD-spælari + 4 pikadekk á felgum. Kr. 15.000,-
Tlf. 442151/229913

FORD ESCORT 16V
til sølu, er í sera góðum standi. Km 64.000. Nýggj pikadekk fylgja við. Prísur 53.000 kr.
Tlf. 268506

TOYOTA CARINA E 2.0 GLI
árg. 96, í góðum standi, sýnaður í ár, til sølu.
Tlf. 254040

ALUMINIUMS FELGUR
185/60/14 4 hol við nýggjum Goodyear lamel dekkum. Prísur 3.500 kr.
Tlf. 283756

TIL SØLU
Ein Toyota Corolla EE80, árg. 1986 til sølu sum eykalutir. Nógvir nýggir deilir fylgja við.
Tlf. 504805

NISSAN MICRA TIL SØLU
Nýsýnaður Nissan Micra, árg. 92 til sølu fyri 14.000 kr.
Tlf. 256495

Amboð

TIL SØLU
Black & Decker Hovermaster GX530 C græsslámaskine m. 30 cm. kniv til salg. 1.000,- kr.
Tlf. 448506

TIL SØLU
Partner De Luxe hondsláimaskina til sølu fyri 500 kr. Bert brúkt eina ferð.
Tlf: 448502/580116

FLYMO
hava-støvsúgvari (Garden vac.) bíliga til sølu.
Tlf. 441145

Arbeiði

AU-PAIR
Føroysk familja í London søkir eftir au-pair til at byrja eftir summarfrítíðina. Um hetta hevur tin áhuga vinarliga ring á
tlf. 0044 2089464888

TILBOÐ UPP Á VERANDU
Vit sóknast eftir fólki, sum vilja geva eitt tilboð at gera eina verandu uttan fyri hús okkara í Havn.
Ringið tlf. 229229/217817

MONTØR ARBEIÐI
Vit sóknast eftir ungum, dugnaligum og arbeiðssomum manni, til at montera garaguhurðar. Byrjast má skjótast tilber. Løn sambært avtalu. Ring og hoyr nærri, helst eftir dagurða á
tlf. 217686

WORK WANTED
Part time: evenings and weekends, skilled in mig and arc welding; truck and trailer repairs; machine repairs; construction labour.
Tlf. 442559

ARBEIÐI YNSKIST
16 ára gamal drongur ynskir arbeiði. Alt hevur áhuga. Ring
Tlf. 318424 ella 27556

SVIMJIVENJARI SØKIST
Fuglafjarðar Svimjifelag søkir eftir venjara til svimjiárið 2004/2005. Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 6. juli 2004. Meira fæst at vita við at ringja tlf. 227773.
Fuglafjarðar Svimjifelag

TILBOÐ YNSKIST
Tilboð ynskist at klæða hús við plast. Skjøldrar, síður og úthang.
Ring 223811 á Toftum

ARBEIÐI YNSKIST
16 ára gomul genta søkir arbeiði í Havn. Havi royndir við barnaansing, havaarbeiði og í handli. Alt hevur áhuga..
Tlf. 252983

TILBOÐ YNSKIST
upp á at smiða altan í Havn.
Tlf. 212358

FLISER
Mindre flisearbejde udføres.
Tlf. 314434 el. 228058

HEY HEY TIT ØLL
Eg eri ein 16 ára gomul genta, sum átaki mær alla barnaansing. Ring og hoyr nærri á
Tlf. 257628

TILBOÐ YNSKIST
upp á skiftan av tekju á einum gomlum húsum skjótast til ber.
Tlf. 448390

ARBEIÐI YNSKIST
14 ára gamal álítandi drongur søkir arbeiði eftir skúlatíð, nakrar tímar um vikuna.
Tlf. 455266/263336, Hans Andrias

FÁ TAKIÐ MÁLAÐ
Um tit ynskja at fáa takið málað, so ring og fá eitt gott tilboð. Eisini verður givið tilboð uppá klædning og vindeygu. Vit hoyrast á
tlf. 271105

GRAVING Í TÓRSHAVN!
Vit átaka okkum at gera alt vanligt gravi- og brekkiarbeiði so sum snøgga rundan um húsini, grava fyri bílhúsi, hjalli, garði o.ø.Við maskinu.
SP/F ENL, tlf. 223717

Barnaútgerð

TREMMUSONG OG PARAPLYSTÓLUR
í góðum standi, til sølu fyri kr. 600,-.
Tlf. 317332

KOYRIPOSAR
Óbrúktur før. skinn 500 kr. (Nýprísur 1000 kr.) Myrkabláur Brio 200 kr.
Tlf. 310649

BARNABAÐIKAR
Reytt baby/barnabaðikar v/stativi + setur og 2 deilt fat til sølu fyri kr. 350,- Alt keypt frá B & B.
Tlf. 318275

SYSTKINASETUR
Systkinasetur til barnavogn lætt at á- og avmontera til sølu fyri kr. 200,-. Keypt frá B & B.
Tlf. 318275

BARNASONG
Barnasong í góðum standi ynskist til keyps. Til barn upp á 2 ár
Tlf. 318283

MYRKABLÁUR SIMO
tvíburavognur/combi við lufthjólum og aluminiumssteli (blátt). Liftir, selar, posar, net, regnslag og pumpa fylgja við.
Tlf. 457787

TIL SØLU
Koyristólur, svartur/gráur við lufthjólum og aluminium stell (silvurgrátt). Posi, regnslag og pumpa fylgja við.
Tlf. 457787

YNSKIST TIL KEYPS
Trappuportur ynskist.
Tlf. 319182/284300

TIL SØLU
Myrkabláur Silver Cross barnavognur við lift, 2.200 kr. Grulvigarður, 250 kr.
Tlf. 313133, e. kl. 17.00

KOMBIVOGNUR YNSKIST
Um tað er nakar, sum hevur ein kombivogn í góðum standi frá Brio ella Simo at selja mær, vinarliga ring
tlf. 503032

BARNAVOGNUR
Trille barnavognur til sølu, bert brúktur til 1 barn. Kann gerast um til koyristól. Babylift + puslitaska fylgja við. Nýprísur 5000,- til sølu fyri 3000,-. Áhugað kunnu ringja
tlf. 503983

HVÍT TRÆVØGGA TIL SØLU
Vøkur hvít vøgga úr træi og á hjólum v/ himmali, seingjarrond og madrassu. Hjól og »sving«, kann læsast. Alt sum nýtt, til sølu fyri uml. 1/2 pris.
Tlf. 424070

Bátaútgerð

HØLI SØKIST
Høli søkist í Eysturoynni ella Streymoynni til ein seksæring í uml. 1 ár.
Tfl. 316780

28' SCANIA PLAST BÁTUR
til sølu. Bygdur 1988. Hevur 60 HK Mitsubishi motor. Verður seldur við líni- og snellureiðskapi.
Tlf. 444276

15 FÓTS SPEEDBÁTUR
Við 40 HK-motori til sølu.
Tlf. 447942

TIL SØLU
Nýggjur Mariner páhangsmotorur 6 HK, 4 takts.
Tlf. 455931

GAMALT
4-mannafar bíliga til sølu.
Tlf. 455931

TIL SØLU
50 stampar av svøvlalínu 5 1/2 mm. lítið brúkt, bíliga til sølu.
Tlf. 216126

TIL SØLU
25 tons fiskibátur við nógvari útgerð. Hevur onki fiskiloyvi. Er eisini væl egnaður til frítíðarbát. Er bíliga til sølu.
Tlf. 216126/371126

HYDRAULIK PUMPA
til drev til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 222211

VOLVO PENTA
Ein húsi, tann niðari, til VP 290 Duo Prop drev, sum nýggjur, til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 222211

VOLVO PENTA MILLUMSTYKKI
millum Volvo Penta diesel og Mercruiser/OMC drev, komplett, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 222211

VOLVO PENTA DYNAMO
24 V, til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 222211

VOLVO PENTA STARTARI
24 V, til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 222211

VOLVO PENTA
270 drev, til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 222211

STUTTLEIKABÁTUR »ØRRSKÄR«
27 fót glastreya 3 m. br. 128 HK Volvo Penta marsj, 16 míl, 4 + 2 sovipláss, komfør, køliskáp o.m.a. Sera snotuligur, wc við tanga. 240.000 kr.
Ring 506276-00299542465

MOTORUR TIL SØLU
Gamal SAAB 16–18 HK. Nýumvældur startari.
Ring 558110 eftir kl. 16

Bingo

BINGO
Verður í Stokkhøllini tískvøldið 22. juni.
Eldrafelagið Nón

GOTT BINGO
Verður í Tórshøll 19. juni kl. 20. Millum annað verður krov, gávukort, kjøt og nógv annað. Eisini verður 20 kr-spæl, minibingo og bingola. Øll eru vælkomin.
Tórshøll

GOTT BINGO
Verður í Stórhúshøll leygarkvøldið kl. 19.00. Á lutaseðli: ein Apex-ferðaseðil, gávukort 2x500 kr.
Í Fótbóltur

FRÁ SPASTIKARAFELAGNUM
gott bingo verður í Pállstovu mánakvøldið 21. juni kl. 19. At vinna full pláta 400 kr. Á lutaseðli m.a. gávukort á 2500 kr. frá Smyril Line. Drigið verður millum sølini, eyka spæl, koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Spastikarafelagið

FRÁ EYDNUNI
Stórt bingo verður sunnudagin 20. juni kl. 16.00. Hevuðsvinningur gávukort frá Smyril Line á 2.000 kr. Eykaspælið 1.000 kr.
Eydnan

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík týskvøldið 29. juni. 12 plátur 100 kr. Drigið verður í millum sølini. Høvusvinningur á lutaseðli gávukort á 1000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

MÁLFRØÐI
Eitt breitt úrval av málfrøði bókum bíliga til sølu. Kunnu brúkast til exam.art.-lestur í føroyskum á Føroyamálsdeildini.
Tlf. 421105

Burturm. /funnið

BURTUR
Tann sum hevur skrúva skermin og peruna av útilyktini á húsunum hjá Martin hjá Evu Peturi á Sandi, verður biðin um sum skjótast at skrúva skermin og peruna á aftur.

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð ynskist í Havn ca. 1. september 2004, av kvinnu, ið fer væl um, royki og drekki ikki, havi fast arbeiði og gjaldi til tíðina.
Telefon +45 26189104

UNGT PAR
Ungt par við einum barni søkir eftir íbúð í Havnini. Max. 4500 kr. um mór. Fara væl um og gjalda til tíðina. Vinarliga ring
tlf. 216717 ella 318997

SUMMARÍBÚÐ YNSKIST Í ABERDEEN
Summaríbúð ynskist til leigu frá 12. juli til 19. juli í Aberdeen.
liselarsen41@hotmail.com, SMS boð 00298 215570

MAMMA VIÐ EINUM BARNI
Søkir íbúð í høvuðsstaðarøkinum skjótast gjørligt. Fari væl um og gjaldi til tíðina. Alt hevur áhuga.
Tlf. 332311

HJÁLP!
Eg eri ein ung kvinna í 20-árunum við barni á veg og ongastaðni at búgva. Skal helst vera í Tórshavnar umráðnum, tó ikki ein treyt. Um tú fært hjálpt mær, so vinarliga ring
tlf. 255978

ÍBÚÐ YNSKIST
í høvuðsstaðarøkinum skjótast gjørligt. Alt hevur áhuga.
Tlf. 257611

ÍBÚÐ ELLA KAMAR YNSKIST
Hevur onkur íbúð ella kamar at leiga mær í Fuglafirði, Leirvík, Gøtu ella í Runavík? Eg eri 22 ára gamal og havi fast arbeiði. Vinarliga ring
Tlf. 223907 ella 371506

HJÁLP!
Íbúð/kamar ynskist í Havn. Ungur friðarligur maður ynskir lítla íbúð ella stórt kamar skjótast gjørligt.
vinarliga ring 310995/221628

ÍBÚÐ Í ÁRHUS C
Møblerað 2-rúms íbúð á Nørreport kollegiet til framleigu í 1 ár. Frá 15. juli 2004 til 15. juli 2005. Íbúðin er tætt við miðbýin og beint við Universitetið. Ring og hoyr nærri á
tlf. 0045 22797105 ella 0045 30623623

HÚS TIL LEIGU Á SJÆLLANDI
í viku 30–32. 40 min. í bili til Kbh. 20 min til strond, 3 kømur, 8 sovipláss, stórur havi. Stutt til handils. Gott tok- og bussamband. Kr. 2.000,- pr. viku.
Tlf. 0045 47101713/0045 60924686

ÍBÚÐ YNSKIST
Eldri friðaligur maður ynskir íbúð/hús í Havn ella nærhendis.
Tlf. 216673

SOS SOS
Vit eru uppsøgd til 1. aug. av tí at húsini skulu seljast. Um tit kunnu hjálpa, vinarliga hjálpi. Max. 6.000 kr. pr. mðr. Vit eru 2 gentur og eitt barn.
Tlf. 253033

EIGARAÍBÚÐ YNSKIST
til keyps. Undir 50 fermetrar ongan áhuga.
Ring 266535 ella 506610

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í KBH
Raðhús við hava, 100 fermetrar, 3 kømur, møblerað. Nær við S-tok og strond. 13 min. frá centrum, frá 1/7 til 1/8.
Tlf. 582285

SUMMARHÚS
til leigu í Svínoy.
Tlf. 272363

ÍBÚÐ/LOFT
tætt við rundkoyringina í Kollafjarðardali er til leigu.
Tlf. 421582

ÍBÚÐ SØKIST Í HAVN
Mamma við tveimum børnum, 8 og 10 ár, søkir íbúð. Fer væl um og drekkur og roykir ikki. Hevur arbeiði og betalir til tíðina.
Tlf. 272991

KAMAR
nærhendis Handilsskúlanum til leigu til friðarligt mannfólk, ið ikki roykir.
Tlf. 503792

ÍBÚÐ TIL FRAMLEIGU Í KBH
Íbúð til framleigu í Keypmannahavn frá 1. sept. og í fyrstu syftu eitt hálvt ár fram. Íbúðin liggur í einum góðum villakvarteri í Valby við góðum grannum og íbúðin er 65 fermetrar við køki/alrúmi, sovikamari, barnakamari og stórum baðiverilsi. Íbúðin verður framleiga við møblum! Húsaleigan er 7.000,- alt incl. Áhugað kunnu ringja á
tlf. 0045 26206468 og hoyra nærri

HÚS YNSKIST TIL LEIGU
í Tórshavnar-umráðnum. Helst við garagu. Max. 6.000 kr. um mór. Ynskist frá 1. september 2004.
Tlf. 224910 - 317865

HÚS Á BYGD TIL LEIGU
Hava 3 kømur, stovu og køk.
Tlf. 508878

TIL LEIGU
4 vers. íbúð, 109 fermetrar, til leigu á Vesturbrúgv frá 1. juli til 1. august. Íbúðin liggur tveir minuttir til gongu frá Fiskatorginum, og beint við Dybbølsbro tokstoð. Kann ikki liggja betur fyri. Kostnaður er 5000 kr. fyri allan mánaðin, tó kann tosast um styttri leigumál. Ring og hoyr nærri.
Heima: +45 33242430 Mobil: +45 30478793

SUMMARFRÍ Í ODENSE
Hevur onkur kamar ella íbúð at leiga mær frá fyrst í august, í 1-2 vikur. Prísuppskot uml. 1000 kr. pr. viku.
Tlf. 313372, e. kl. 18 e-post: olselsba@hotmail.co

KAMAR/ÍBÚÐ YNSKIST Í ODENSE
Eg skal til Odense í lestrarørindum og leiti eftir kamari/íbúð til leigu/framleigu í stytri ella longri tíð. Alt hevur áhuga. Eg fari væl um. Royki og drekki ikki.
Tlf. 313372 e. kl. 18, e-post: olselsba@hotmail.co

FRAMLEIGA Í KHB
Ljós møblerað 3 rúmsíbúð í Valby í tíðarskeiðinum 22. juni til 14. sept. 2004. Prísur 3.500 kr. um mðr.
Ring 0045 40384889

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST Í KLAKSVÍK
Kvinna við 3 børnum ynskir íbúð/hús í Klaksvík. Eru álítandi, røkin og friðarlig. Skrivi til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1854g

LÍTIL ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn til 22 ára gamla gentu frá 1. aug. ella fyrr.
Tlf. 222457

FRÍTÍÐARHÚS Í NÓLSOY
Slappa av í gomlu Petersen-húsunum (nýrenoveraði).
tlf. 212717/222327

ÍBÚÐ Í KBH TIL LEIGU
Møblerað íbúð, 100 fermetrar, í Brøndby Strand til leigu í juli mánað. Íbúðin liggur nær við strond og S-tokstoð (18 min. til Hovedbanegården).
Tlf. 43738597/23707393

TIL DANMARKAR Í SUMMAR?
Vit hava eini hús mitt í Hillerød við afturlatnum urtagarði, 5 mín frá S-toki, 1/2 tími frá Keypmannahavn, sum vit fegin vilja býta um við hús í Havn, Skála ella Strondum einaferð í tíðarskeiðinum 3/7 til 26/7. Áhugað kunnu ringja á
tlf. 0045 21414820

MØBLERAÐ ÍBÚÐ Í HAVN
til leigu19. juni til 1. august. Pris pr. viku ella pr. dag.
Ring 257940

ÍBÚÐ Í KBH
Møblerað 3 - rúms íbúð í Valby verður framleiga í tíðarskeiðnum 22. juni til uml. 14. sept. 2004. Íbúðin liggur tætt við tokstoð og bussar, tætt við handlar og Søndermarkina, 7-10 min. á súkklu tilRáðhúsplássið. Prísur 3.500 um mánaðin. Ring ella send t-post:
Tlf. 36444889/40384889, gunnvaz@hotmail.com

SUMMARFRÍ Í KBH
Ein 2-rúms íbúð á Oyrasundskolleginum til leigu frá 25. juni til 15. aug. Er útleigað 10.- 24. juli. Kost. 900 kr. um vikuna.
Tlf. 373764

SKÁLAVÍK
Góð frítíðarhús, sum liggja væl fyri við góðum útsýni, verða leigað út í styttri tíðarskeið. Húsini hava allar neyðugar hentleikar. T-post: debes@post.olivant.fo heimasíða: http://heima.olivant.fo/~debes
Tlf. 311197 ella 211192

ÍBÚÐ
Maður, síðst í 30'unum søkir eftir íbúð ella rúmligt kamar við atgongd til køk og bað,í høvuðsstaðnum.Eg eri sjómaður og havi regluliga inntøku. Vinarliga ringið á
tlf. 319020/583333

ÍBÚÐ Í BRØNSHØJ
Lítil íbúð í Brønshøj til leigu í julimánað. Gott bussamband, umleið hvønn 3-5. minutt. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 317724

Dýr

ROSS TIL SØLU
5 ára gamalt íslendskt ross, við góðari ættartalvu, til sølu.
Telefon 315797

DVØRGA-HAMSTRARAUNGAR
verða latnir djóravinum.
Tlf. 315640/261111

TIL SØLU
Akvarium 128 l. við pumpu, hitalikami fyri kr. 1.000,- Fá nærri at vita, við at ringja
tlf. 317565 ella 211950

TINKER HESTUR TIL SØLU
10 ára gamal Tinker hestur til sølu. Selist til trenaðan ríðara. Áhugað kunnu ringja
Tlf. 266852

NAKRIR HØSNARUNGAR
og nakrir dunnuungar til sølu.
Tlf. 441252/261983

KETTA BURTURBLIVIN
á Deild í Vestmanna. Hon er grá/svort, hálv angora, ikki merkt. Hevur tú sæð hana, ring so á
tlf. 424721

2 SERA FITTIR KETTLINGAR
ið eru reinligir kunnu fáast. Tann eini er svartur, hin er svartur og hvítur.
Tlf. 310871, Johild Maria

KETTLINGAR
2 vanligir føroyskir kettlingar, 1 gráur, 1 svartur og hvítur (frensar) verða lætnir til fólk, ið eru sera góð við kettur. Eru lagdir skirishósdag. Reinligir.
Tlf. 352320/218589/313878

FUNNIN FRESSUR
Grástriputur kettlingur við bláum hálsbandi, hvítur um snýði, undir øsinum og búkinum og hvítar hosur upptikin á Rossagøtu á Argjum.
Tlf. 318981 ella 518982

ER
tað nakar ið hevur eina kanin at geva mær! skal helst vera ein hon.
Vinarliga Lisa 503329

BORDER COLLIE
5 mðr. gamal hvølpur (hannur) verður latin vegna serligar umstøður, bert um hann verður brúktur til seyðahund, so hann kann brúka síni evni.
Tlf. 256039 ella 504848

KETTLINGAR
3 kettlingar, 8 vikur gamlir kunnu fáast. 1 svartur og 1 gráflekkutur, báðir hava hvítur labbar og eru hvítir undir búkinum – løður. 1 svartflekkutur frensur við tumlum.
Tlf. 314894/214894

UNDULÁTUR TIL SØLU
7 vikur gamal undulátur við búri og øllum tilhoyri. Nýprísur 950 kr, til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 722771

BORDER COLLIE HVØLPAR
(tíkar) til sølu. Lagdir 13.04.04.
Tlf. 225418/422681

HEY HEY
Vit eru 3 sera fittir kettlingar sum ynskja gott heim, bert hjá djóravinum.
Tlf. 422076

Fundir

OYÍF
Ársaðalfundurin verður mikukvøldið tann 30. juni kl. 19.00 í leigaðu hølum felagsins. Til viðgerðar niðurskriving av ognum felagsins.
Oyndarfjarðar Ítróttarfelag

FRÁ HEIMAMISSIÓNS-FORLAGNUM NESVÍK
Í samband við at vinnararnir av stuttsøgukappingini verða avdúkaðir verður móttoka í Leguhúsinum í Nesvík mánadagin 21. juni kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Heimamissiónsforlagið

Húsarhaldstól

BÍLIGA TIL SØLU
Nýtt kølí- og frystiskáp (H 142 x L95 x B65 cm). Bíliga til sølu.
Tlf. 333404 aftaná kl. 18

BÍLIGA TIL SØLU
Nýtt kølí- og frystiskáp (H 142 x L95 x B65 cm). Bíliga til sølu.
Tlf. 333404 aftaná kl. 18

STÓR KÓKIPLÁTA
Til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 371673 ella 224836

TIL SØLU
Frystiboks 400 ltr. Vestfrost, hálvtannað ár, fyri 2.500 kr. við heimkoyring. Ring
Tlf. 580777 best eftir kl. 15

FRYSTIBOKS
385 l. til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 371673 ella 224836

Innbúgv

HANDILSINNBÚGV TIL SØLU
Elektrisk vekt 6 kg., plakatrammur (úti), stál ostaskerari, innkeps-vognar, »uppfyllingarvognar«.
Tlf. 371673 ella 224836

TIL SØLU
Ein etagusong við spælirúmi í neðra. Sær út sum nýggj, prísur 500,-
Tlf. 318822

LÚTVIÐGJORD VITRINUSKÁP
Til sølu fyri 1.500 kr. Mát: d. 39 cm x br. 100 cm x h. 180 cm.
Tlf. 321207

BRÚKT SOFA
Brúkt violett/bordeaux sofa til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 312076 eftir kl. 18

ALT ÚT LENE BJERRE DESIGN
Hvitt mynstrut seingjarteppi (til song 140 x 200) v/ orange sprøklutum borda og 3 pútur í hóska til + 2 stoypijarns seingjabordslampur við orange sprøklutum skermi, umframt ein lampuskermur av sama slag undir lofti. Alt til sølu fyri kr. 1.000,-
Tlf. 318275

HURÐAR
4 stk. hurðar við karmi – elm. Tær eru brúktar, 75,- kr. stk.
Tlf. 314678

SKENKUR
Ein vælviðfarin skenkur úr bók til sølu fyri kr. 3.000,- Mát: l. 198 x h. 87 x d. 50
Tlf. 315910

REOLSYSTEM ÚR TEAK
3 sektiónir v/ hillum, skápum og skuffum bíliga til sølu. Sí mynd á www.dalsgaard.info/sale
Tlf. 314724

TIL SØLU
Sovisofa bíliga til sølu, í góðum standi.
Tlf. 503075

SOFABORÐ
Eitt vælviðfarið sofaborð, myrkt við kaklum 800,-
Tlf. 423340

BRIKS
Ein briks (stødd 76x200 cm) úr hvitum melamin, v/ tveimum skuffum, bláari madrassu og trimum bláum pútum, til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 449960 & 252396

KJALLARASØLA
Hjálpið okkum at rudda út. Sera bíliga verður ymist selt í kjallaranum í Trapputún 6, leygardagin 19. juni kl. 15.00. Sofur, lenistólar, barnasong, dupultsong 160x200, boxmadrassur, spísiborð, sofaborð og skrivaraborð, hillar, reolir, lítil uppvaskimaskina og aðrir lutir.
Trapputún 6

TIL SØLU
Boxmadrassa v/ beinum og galvi 140x200, 500,- kr. Eikreol, 4 sektiónir, l. 180 b. 84. d. 44/25, 900,- kr.
Tlf. 444307

TIL SØLU
Myrkt antikt spísiborð v/ útskornum beinum 400,- hvítt klædnaskáp, onnur hurðin spegl l. 205 b. 100. 400,- kr.
tlf. 444307

KLÆDNASKÁP TIL SØLU
Klædnaskáp loft til gólv við dragihurðum 123 cm. br. Kostnaður 500 kr.
Tlf. 315554/210554

BARNASENGUR
2 barnasengur til sølu ca. 70 x 200, onnur kann skumpast undir aðra. Ialt kr. 500,-
Tlf. 321967

REOLSYSTEM ÚR TEAK
3 sektiónir v/ hillum, skápum og skuffum bíliga til søl